**Rossamálið - nágreinandi upprit**

Við brævi til uttanlandsnevndina frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, dagfest 27. mars 2008, viðvíkjandi innflutningi av rossum varð upplýst, at embætisfólk frá báðum pørtum, eru vorðin samd um at mæla til eina loysn, sum hevur við sær, at broytingar skulu gerast í felagsnevndaravgerð nr. 1 frá 2001, ið inniheldur treytirnar fyri heilsufrøðiliga sáttmálanum millum Føroyar og ES.

Upplýst varð eisini, at hesar broytingar hava við sær, at Føroyar binda seg til at seta í verk viðkomandi ES lóggávu, og víst varð í hesum sambandi til hjálagt uppskot til felagsnevndaravgerð um broytingar í felagnevndaravgerð nr. 1 frá 2001, við tilhoyrandi skjali við ES lóggávuni talan er um.

Til hetta skal viðmerkjast, at rætt er at Føroyar - við at taka undir við felagsnevndaravgerðini – binda seg til ávísa ES lóggávu, men at tað við atliti at stýriskipanarlógini § 52, stk. 2, 1. pkt. kann leggjast afturat, at øll lóggávan, sum Føroyar eftir ætlan koma at binda seg til, longu frammaundan er sett í gildi í Føroyum. Av somu orsøk krevur felagsnevndaravgerðin ikki luttøku løgtinsins fyri at verða útint.

Sambært upplýsingum úr Vinnumálaráðnum er umrødda ES lóggáva sett í gildi við ymiskum kunngerðum frá 2007 innanfyri karmarnar av djórasjúkulógini, og djóraverndarlógini. (Sí hjáløgdu lýsing *" State of play concerning application of EU legislation related to the proposal on amendment of Decision No 1/2007 as regards the import of registered equidae directly from Iceland and the movements of such between the Faroes and the EU"*).

Í Tinganesi 31. mars 2008

Uttanríkisráðið

Gunnar Holm-Jacobsen, ráðgevi

01. APR. 2008
2
Løgtingið j. nr. 7.172-20080001